SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

Taski Swingo XP:

# Maskinan er hjartað í reingerðingini

**So hvørt sum reint arbeiðsumhvørvi fær hægri raðfesting fáa tær nýggju framkomnu vaskimaskinurnar alt størri týdning hjá teimum ymisku fyritøkunum. Reyni Service í Hoyvík hevur fingið eina nýggja Taski Swingo XP**




*Sofus Hansen testar nýggju Taski Swingo XP vaskimaskinuna*

BILVERKSTAÐUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bilverkstaðurin hjá Reyni Service hevur í mong ár verið eitt fyridømi í so nógvar mátar, eitt nú við at har altíð er reint og ruddiligt.

Heðin Hansen, verkførari hjá Reyni Service, sigur, at ein góð vaskimaskina er hjartað í allari reingerð. Fyri at lætta um arbeiðið við reingerðingini, keyptu vit fyri seks árum síðan eina "Taski Combimat 2500" reingerðingsmaskinu, sum hevur verið brúkt hvønn dag við sera góðum úrsliti. Reingerðingin bleiv so nógv lættari og effektivari í allar mátar, har er so at siga eingin samanbering. Fyrr var avfeittari stroyddur á gólvið, og vit vaskaðu við kustum.

Maskinan verður brúkt allan dagin. Tá ein umvæling er liðug og bilurin farin út, vaskar tann sum hevur gjørt umvælingina økið, har bilurin hevur staðið, so tað er klárt til næsta bil. Soleiðis verður verkstaðurin hildin reinur gjøgnum dagin. Umframt tað verður eisini vaskað, áðrenn vit fara til hús fríggjadag. Tí hevur tað so stóran týdning at vaskimaskan er løtt at handfara og at umgangast í tí dagliga.

## Góð tænasta

Av tí at vit leggja so stóran dent á reint arbeiðsumhvørvi, hava vit nú fingið eina nýggja og enn meira effektiva vaskimaskinu. Talan er um eina Taski Swingo XP. Hendan er gjørd soleiðis, at tann sum koyrir maskinuna hevur sera gott útsýni, har sum hann vaskar. Maskinan arbeiðir skjótt og effektivt, eins og hon er løtt at koma runt við á gólvinum.

Maskinan er tøkniliga framkomin og umhvørvisvinarlig. Hon brúkar lítla orku, í mun til tað hon kann og ikki meira vaskievni enn hægst neyðugt. Einki fer til spillis. Sjálvar bustirnar undir maskinuni eru soleiðis gjørdar, at tær bæði vaska og skúra samstundis.

Tænastan er sera góð. Um vit av ósketni koma at bróta okkurt á maskinuni, fáa vit eykalutir beinanvegin, og einferð um árið verður eftirlit gjørt, sigur Heðin Hansen, verkførari hjá Reyni Service.

Tað er Åge H. Jensen í Havn, sum eigur og rekur fyritøkuna Sp/f A.H.Jensen í Stoffalág, ið umboðar Taski reingerðingsmaskinurnar í Føroyum. Fyritøka selur alt innan reingerð, frá vaskiklútum til stórar reingerðingsmaskinur.




*Heðin Hansen, verkførari hjá Reyni Service, Sofus Hansen, testkoyrari, Åge H. Jensen, frá Sp/f A.H.Jensen, og Sámal av Reyni frá Reyni Service*